# Til læraran




©Rithøvundur og teknari: Edward Fuglø

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2011

Nám: Gunvá Magnussen og Lis G. í Jákupsstovu

**Um bókina**

Vampýrella er um tvíburarnar Karl og Knút og stórusystir teirra Ellu. Tey trý systkini búgva saman við mammuni og manninum hjá mammuni. Tey hava tað gott og hugnaligt saman til knappliga ein dagin, tá ið Ella broytist til Vampýrellu. Vit hoyra um, hvussu strævið tað gerst hjá beiggjunum báðum, tí systirin er so ræðuliga nógv øðrvísi, enn hon plagdi at vera. Teir gera av at kanna, hvat hendir við systrini.

Edward Fuglø hevur teknað og skrivað, og sigast kann, at tekningar og tekstur stuðla hvørjum øðrum. Tekstur og litrík tekning er á hvørjari opnu. Viðhvørt sært tú meira í tekningini, enn teksturin sigur, og viðhvørt sigur teksturin meira, enn tekningin vísir.

Vit meta, at uppgávurnar hóska til 4. – 6. fl. og at arbeiðsgongdin tekur umleið 20 undirvísingartímar.

Vit mæla til, at lærarin lesur tekstin fyri næmingunum, áðrenn tey arbeiða við uppgávunum, og at arbeitt verður við torføru orðunum í tekstinum, tó ikki um uppgávan leggur upp til, at næmingarnir skulu arbeiða við onkrum av hesum orðunum.

**Uppgávur og arbeiðsgongd**

Uppgávurnar eru bygdar upp eftir leistinum áðrenn tit lesa, meðan tit lesa og aftaná lesnað. Ein uppgáva er til áðrenn tit lesa, hetta meta vit tekur umleið 1 undirvísingartíma. Síðan eru nakrar uppgávur til meðan tit lesa, tær uppgávurnar fylla mest og taka nokk umleið 1 undirvísingartíma hvør, onkur kanska 2 tímar. Restin er til, tá ið tit hava lisið, og meta vit, at tær uppgávurnar taka um 2 – 3 undirvísingartímar.

Uppgávurnar eru skipaðar bæði sum einstaklingauppgávur, makkarauppgávur og bólkauppgávur. Onkrar av uppgávunum leggja upp til prát í flokkinum og framløgur.

**Úr námsætlanini**

Vit hava hugt í námsætlanina og meta, at nomið verður við hesi førleikamál fyri 2. – 6. fl.

*Talaða málið*

- *at nýta talumálið klárt og skilliga í t.d. kjaki, samrøðu og framløgu*
- *at lurta virkin og seta greinandi og metandi spurningar*
- *at seta orð á egnar kenslur og hugsanir*
- *at nýta málið sum amboð í samrøðu og samstarvi*

*Skrivaða málið*

- *at skilja og greina ymiskar tekstir við grundleggjandi bókmentafrøðiligum hugtøkum*
- *at tekna, svara skrivligum spurningum ella á annan hátt vísa, at tað lisna er skilt*
- *at finna høvuðsinnihaldið í fagurbókmentaligum tekstum*
- *at gera skrivligar viðmerkingar til tað, hann hevur sæð, hoyrt ella lisið*

*Samansettir tekstir*

- *at tosa um fagurfrøðiliga leiklutin og endamálið við samansettum tekstum*
- *at skilja og greina ymiskar samansettar tekstir*
- *at tosa um, hvussu orð og mynd virka saman í myndabókum*

Góðan arbeiðshug.